September 2022

# Vanlukkutrygging

*Skjal við upplýsingum um vanlukkutryggingina*

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um vanlukkutryggingina. Tá ið skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348600 og fáa nærri vegleiðing.

## Hvat slag av trygging er talan um?

Vanlukkutryggingin er persónlig og tekur við, um tú kemur út fyri eini vanlukku. Tá ið ein vanlukka hendir, taka lækni, skaðastova og heilsuverk sær av tær alt fyri eitt. Men summar vanlukkur elva til varandi mein. Tá er gott at hava vanlukkutrygging.

### Hvat dekkar tryggingin?

Vanlukkutryggingin fevnir um flestu vanlukkur, skaðar og óhapp, ið tú og tíni kunnu koma út fyri. Ein vanlukka er ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða. Les meira um hetta í tryggingartreytunum.

Vanlukkutryggingin veitir eitt nú endurgjald fyri:

- ✓ Tannskaðar
- ✓ Viðgerðir
- ✓ Brillur/Hoyritól
- ✓ Útgjald við avlamni
- ✓ Útgjald við deyða
- ✓ Sálarfrøðilig kreppuhjálp

### Tú kanst eisini velja:

- ✓ Skundendurgjald
- ✓ Tyggiskaðar

Vanlukkutryggingin er persónlig fyri øll yvir 18 ár. Tó ber til hjá foreldrum at tekna øll børnini undir 18 ár á eina og somu barnavanlukkutrygging.

Tó er týdningarmikið at skráseta øll børnini á tryggingarskjalið, fyri at tey skulu vera dekkað.

Upphæddirnar, tú ynskir fyri avlamni og deyða, vera avtalaðar og settar í tryggingarskjalið.

Les meiri á Mín Trygging, ið tú finnur á heimasíðu okkara ella sum app.

### Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um tað, sum vanlukkutryggingin ikki dekkar. Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit fært tú í tryggingartreytunum.

- x Vanlukkutilburðir, sum henda, meðan tú ert ávirkað/ur av rúsi
- x Skaða av smittu, t.d. frá bakterium og virusi
- x Fylgjur av avlamni, ið var áðrenn vanlukkutilburðin
- x Vanlukkutilburðir, sum henda av grovum ósketni ella við vilja

### Eru avmarkingar í dekningum?

Her eru nøkur dømi um avmarkingar í dekninginum. Hesar avmarkingar eru grundaðar á, at sumt virksemið hevur serligan váða.

Til ber tó at tekna serstaka tilvalstrygging til hetta.

Um serstøk tilvalstrygging ikki er gjørd fyri niðanfyrinevnda virksemi, kann endurgjaldið fella heilt ella lutvíst burtur.

Legg til merkis, at listin ikki er fullfíggjaður. Fullfíggjað yvirlit sært tú í tryggingartreytunum.

- ! Koyrir tú motordrivna súkklu, har ferðin er omanfyri 45 km/t
- ! Luttekur tú í motorkappkoyring av øllum slagi.
- ! Ert tú flogskipari ella manning í tjóðarskrásettum flogfari
- ! Luttekur tú í nevaleiki, karatu, fjallaklintring, kaving o.t.
- ! Starvast tú á oljuboripalli

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo

## Sjálvsábyrgd

Tú kanst ikki áseta eina sjálvsábyrgd.

## Hvar dekkar tryggingin?

Tryggingin dekkar allastaðni í Føroyum, Danmark og Grønlandi. Hon tekur somuleiðis við í upp til trý ár í Evropa og upp í eitt ár aðrastaðni í heiminum.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir**

- Boða okkum frá skaðanum skjótast gjørligt. Tað kann gerast á www.betri.fo, á tel 348 600 ella umvegis "Mín Trygging"
- Hevur tú fingið skaða, skalt tú hava neyðuga læknaviðgerð. Betri Trygging hevur rætt til at biðja um upplýsingar frá lækna, ið viðger ella hevur viðgjørt teg, eins og lata teg kanna av einum lækna, sum felagið velur

**Tá ið broytingar eru**

- Boða okkum frá, tá ið tú flytir bústað.
- Gerst tú arbeiðsleys/ur ella arbeiðir minni enn 30 tímar um vikuna, skalt tú boða Betri Trygging frá hesum í seinasta lagi innan 3 mánaðir. Boða Betri Trygging frá, beinanvegin tú fert aftur til arbeiðis
- Hevur tú heiltíðartrygging og skiftir starv, skal Betri Trygging hava boð um hetta beinanvegin
- Hevur tú frítíðartrygging og gerst sjálvstøðug/ur vinnurekandi, skal Betri Trygging hava boð um hetta beinanvegin

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga.
Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi í eitt ár, um ikki annað er avtalað í tryggingarskjalinum. Hon heldur sjálvvirkandi fram, um hon ikki verður uppsøgd.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tú kanst siga tryggingina upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

Somuleiðis kanst tú siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um tú gert tað innan 14 dagar eftir, at ein skaði er útgoldin ella avvístur.

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo